PREKVALIFIKATIÓN

## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

Landsverk er byggiharri fyri almennar uppgávur, og henda verkætlan verður útboðin vegna Mentamálaráðið.

**Útbjóðandi myndugleiki:**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
www.landsverk.fo
lv@lv.fo

**Mannagongd fyri útbjóðing**
Innboðin lisitatión í høvuðsentreprisu í prekvalifikatión. Ætlandi verður heitt á 4-6 tilboðsgevarar at bjóða.

**Lýsing av verkætlanini**
Verkætlanin umfatar ein fiskivinnuskúla, ið skal byggjast á økinum við ferjuleguna í Vestmanna við plássi fyri 100 næmingum, tilsamans umleið 1300 m². Boðið verður út í høvuðsentreprisu.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til Landsverk ella umvegis teldupost til lv@lv.fo

Áheitanin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 1. mars, 2007.

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út saman við útbjóðingartilfarinum um miðjan mars 2007.

**Samtøk og felagsskapir**
Allir luttakarar í einum samtaki ella líknandi felagsskapi skulu geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrgding fyri sáttmálanum. Felagsskapir og samtøk skulu harafturat frammanundan tilnevna ein umboðsmann við skjalprógvaðari fulltrú til, vegna felagsskapin ella samtakið, at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til prekvalifikatiónina**
Umsøkjarar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesar upplýsingar:

- Upplýsingar um arbeiðstakarans egnu viðurskiftir og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikarnar til meting av tí kravdu minstuorku av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slagi.
- Upplýsingar um bygnaðin hjá fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðurfelag.
- Stutt lýsing av, hvussu uppgávan verður loyst. Dentur verður lagdur á leiðslu og stýring, logistikk, byggitíð, trygging av tilfarsveitingum og góðskutrygging.
- Váttan ella trúnaðarváttan um, í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
- Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við váttan av samlaða umsetninginum í meðal seinastu trý árini.
- Upplýsing um árliga meðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.
- Ummæli frá samsvarandi uppgávum.
- Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.
- Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir, umfram umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

LANDSVERK
*byggir land*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

# Maskinmeistarar

Við hesum verður søkt eftir einum maskinmeistara at seta í fast starv og einum at seta í farloyvisstarv í tíðarskeiðinum 12. mars 2007 til 8. oktober 2007.

Freistin at søkja størvini er fríggjadagin 23. februar 2007 kl. 12:00

Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

sansir.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS



# Hús til sølu

Húsini í Liða í Nólsoy eru til sølu, um hóskandi boð fæst. Í húsunum, sum eru ein fornur dýrgripur, eru allir hentleikar.

**Áhugaði kunnu ringja á tlf. 228909**
**– ella senda e-post á vilmund@sosialurin.fo**